UTTAN ÚR HEIMI

## Innflytarar kannast

Tann konservativi andstøðuflokkurin í Bretlandi heldur, at fremmandafólk, sum ætla sær at búgva í Bretlandi í eitt ár ella meiri, skulu heilsukannast, og kanningina skulu tey sjálvi gjalda. Kanningin skal umfata øll, sum koma úr londum uttan fyri ES, men vanlig flóttafólk eru kortini undantikin.

Formaðurin hjá teimum konservativu, Michael Howard, hevur sett viðurskiftini viðvíkjandi teimum nógvu fremmandafólkunum ovarlaga á dagsskránna, nú val verður í Bretlandi í næstum. Flokkurin sigur tað vera alneyðugt at viðgera hesi viðurskiftini. Tað heldur stjórnarflokkurin Labour eisini, og báðir flokkar hava fleiri uppskot á økinum.

Michael Howard sigur, at uppskotið um at kanna heilsuna hjá fremmandafólki er gjørt eftir tilsvarandi uppskotum, sum verða viðgjørd í Avstralia, Ný Sælandi og Kanada í hesum døgum. Eftir hesum uppskotunum skulu tey fremmandu kannast fyri eitt nú eyðkvæmi og tuberklar.

## Bjargar ikki mannalívum

Kanningar í USA benda á, at vaksina, sum eldri fólk fáa ímóti influensu, hevur ikki bjargað einum einasta mannalívi seinastu 30 árini.

Tey, sum hava skipað fyri kanningini, siga, at fólk hava vanliga ta uppfatan, at verða tey eldru ikki vaksinerað ímóti influensu um veturin, er stórur vandi fyri, at tey fara at doyggja, gerast tey sjúk. Men hagtøl tey seinastu 30 árini hava avdúkað, at hetta er ikki so, siga tey. Kortini ætla amerikonsku heilsumyndugleikarnir ikki at mæla teimum eldru frá at lata seg vaksinerað. William Thompson á heilsustovninum í Atlanta sigur við AP, at eftir hansara tykki er tað framvegis eitt gott hugskot at vaksinera tey eldru.

Amerikanska heilsuverkið mælir til, at fólk, sum eru farin um tey 50, verða vaksinerað, og tað sama er galdandi fyri børn, sum eru ímillum seks mánaðir og tvey ár. Kvinnur, sum eru við barn, eiga eisini at verða vaksineraðar og somuleiðis fólk, sum líða av ymsum varandi sjúkum.

## Ferðafólkini afturkomin

Yvirgangsatsóknin at USA 11. september í 2001 hevði millum annað við sær, at ferðafólkatalið í Meksiko minkaði nógv, men nú eru viðurskiftini um at koma aftur í rættlag.

Í fjør vitjaði 20,6 milliónir útlendsk ferðafólk Meksiko. Tað var tíggju prosent fleiri enn árið fyri og tað mesta síðani 2001. Ein stórur partur av vøkstrinum stavar frá ferðamannaskipum, sum steðgaðu á í meksikonskum havnarbýum. 7,6 milliónir ferðafólk vóru við skipunum, og tað var ein millión fleiri enn árið fyri, siga myndugleikarnir.

Inntøkurnar frá ferðavinnuni vóru næstan 60 milliardir krónur í fjør, og tað er tað mesta nakrantíð. Samstundis útvegaði ferðavinnan umleið 66.000 arbeiðspláss í fjør.

## Hann oyðslar

Swaziland í Afrika er eitt tað fátækasta landið í heiminum. Harafturat er landið illa plágað av eyðkvæmi, men tað forðar ikki Mswati kongi at spilla almennar pengar burtur.

Mswati kongur hevur tíggju konur, og BBC veit at siga, at nú hevur hann keypt konunum hvør sín bil av slangum BMW. Prísurin er um fimm milliónir krónur. Fyri tveimum mánaðum síðani keypti kongur sær sjálvum ein Daimler Chrysler Maybach fyri umleið 2,8 milliónir krónur. Í fjør ætlaðui kongur at keypa sær eitt privatflogfar fyri góðar 300 milliónir krónur, men tað varð kortini av ongum. Eitt uppskot um at byggja teimum tíggju konunum hvør sína borg er heldur ikki sett í verk enn.

1,2 millión fólk búgva í Swazilandi, og sambært ST líða umleið 90 prosent av fátækradømi, og 40 prosent er smittað við HIV. Tann 37 ára gamli kongurin tók við valdinum eftir pápan, sum doyði í 1982.



Spanska ferðamannaskipið rak fyri vág og vind í tveir tímar

# 776 ferðafólk í havsneyð

**Eitt spanskt ferðamannaskip kom í havsneyð har vesturi í Miðjarðarhavinum, tí motorarnir steðgaðu**

ILLVEÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Spanska skipið var á veg úr Tunis til Barcelona, tá tað kom í illveður einar 75 fjórðingar úr sponsku oynni Menorca har vesturi í Miðjarðarhavinum.

Skipið fekk ein sjógv, sum breyt fleiri rútar á brúnni, eftirlitsskipaninar steðgaðu av skammlopi, og tað gjørdi, at motorarnir steðgaðu, so skipið rak fyri vág og vind. Skiparin sendi alt fyri eitt neyðarkall og bað um hjálp, og bæði sponsk og fronsk hjálparskip vórðu send avstað alt fyri eitt.

Tað eydnaðist kortini maskinmonnunum at fáa tveir av motorunum í gongd einar tveir tímar seinni, so skipið kundi halda leiðina fram.

Hóast skipið livdi nógv í sjónum, fekk einki ferðafólk skaða. Ein bretskur ferðamaður greiddi BBC frá, at hann bleiv slongdur úr koyggjuni, tá skipið legði seg.

776 ferðafólk vóru við skipinum.

# Sýrialand fær skyldina

**Libanska andstøðan og amerikanska stjórnin eru á einum máli um, at fyrrverandi libanski forsætisráðharrin bleiv myrdur eftir boðum úr Sýrialandi**

LIBANON
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Minst tólv fólk, teirra millum fyrrverandi forsætisráðharrin Rafik Hariri, doyðu í teirri sera hørðu bumbuspreingingini í libanska høvuðsstaðnum Beirut fyrradagin. Spreingingin var so hørð, at tann serbygdi bilurin hjá fyrrverandi forsætisráðharranum fór í smildur, og fleiri hús nærhendis bumbustaðnum fingu stóran skaða.

Ein higartil ókendur felagsskapur hevur átikið sær ábyrgdina av álopinum, men í Libanon er andstøðan ikki í iva um, at tað var grannalandið Sýrialand, sum legði álopið til rættis. Andstøðan vísir á, at Rafik Hariri vildi hava Sýrialand at taka sínar hermenn úr Libanon, og andstøðan vil vera við, at tað var hetta, sum kostaði fyrrverandi stjórnarleiðaranum lívið.

Amerikanska stjórnin hevur somu áskoðan, og ein embætismaður segði við New York Times í gjár, at tilburðurin í Beirut ger, at USA fer at leggja uppaftur størri trýst á stjórnina í Damaskus. USA hevur leingi lagt Sýrialand undir at stuðla altjóða yvirgangi og at hjálpa uppreistrarmonnunum í Irak, og nú ber USA ótta fyri, at bumbuspreingingin í Beirut fer at órógva friðarroyndirnar hjá ísraelsmonnum og palestinum.

Sýriska stjórnin hevur avsannað, at hon hevði nakað við bumbuspreingingina í Beirut at gera. Tvørturímóti hevur stjórnin sagt seg harmast tað, sum hendi, men í Washington verður hetta ikki tikið fyri fult.

– Vit hava eingi prógv, men vit hava varhugan av, at tað var Sýrialand, sum skipaði fyri álopinum, sigur embætismaðurin við New York Times.

Sýrialand hevur havt 15.000 hermenn í Libanon síðani borgarakríggið har í áttatiárunum, og í veruleikanum hevur Sýrialand fult eftirlit við øllum landinum.